**SIÐUR.** Aldargamlur skotskur siður innivist á Føroyamálsdeildini á Debesartrøð í Havn, tá føroyskur løgfrøðingur fekk handað „húgvuna“ frá lærda háskúlanum í Aberdeen



**Kári á Rógvi fær handaða húgvuna frá Styles, lektara í lóg á Lærda Háskúlanum í Aberdeen. Aftanfyri Jóan Pauli Joensen, professari, og Jóannes Dalsgaard, doktari**

# Skotskur siður á Setrinum

*Orð og myndir:*
*Jan Müller*

Mikudagurin 12. apríl fer í søguna hjá Fróðskaparsetri Føroya og The University of Aberdeen sum dagurin, tá skotski siðurin at „heiðra“ ein nýggjan útbúnan „Master“ varð gjøgnumførdur á Føroyamálsdeildini á Setrinum fyri fyrstu ferð.

Kári á Rógvi fekk mikukvøldið handað prógvið - húgvuna - fyri at hava lokið Master of Laws (LL.M) útbúgving í Aberdeen. Tað var Scott C. Styles, lektari í lóg við The University of Aberdeen, sum var komin til Føroya at standa fyri hesum óvanliga tiltaki, á bretskum máli nevnt „Graduation Ceremony“.

Á einum lítlum hátíðarhaldi á loftinum Føroyamálsdeildini fór fram ein heldur sjáldsom seremoni, sum ongantíð áður er farin fram í Føroyum.

Bretar ella rættari skotar hava síðani miðøld hildið lív í tí aldargamla siði at hátíðarhalda løtuna, tá útbúnir løgfrøðingar, búskaparfrøðingur o.a. fáa handað síni prógv eftir lokna Masterútbúgving. Hetta er ein máti at vísa tí nýggja magistaranum ta tign, sum LL.M. gevur. Oman á sítt kandidatprógv hevur hann nú eisini fingið eitt magistaraheiti.

Kári á Rógvi hevur fingið skotska heitið „Master of Laws“ tvs. eina hægri útbúgving innan løgfrøði. Í Skotlandi hava tey ein greiðan skilnað millum grundútbúgvingar og so yvirbygningin, sum er Masterútbúgvingin. Henda tekur eitt ár.

Tá prógvið verður handað fer fram ein seremoni, har tann, ið gerst magistari, verður leiddur fram fyri „senatið“ hjá universitetinum og har førdur fram av einum av sínum lærarum. Til steðar skulu eisini vera nakrir sokallaðir senatorar sum vitni. Hvørja ferð ein slík seremoni fer fram tilnevnir universitetið í Aberdeen senatorar at vera vitni. Krøvini til senatorarnar eru, at teir skulu vera doktarar. Í sambandi við hetta hátíðarhaldið tilnevndi Universitetið í Aberdeen Jóan Paula Joensen, professara og Jóannes Dalsgaard, doktara og deildarstjóra sum senatorar.

Andras Mortensen, sum sjálvur lesur til doktara hevði so leiklutin sum promotor tvs. at hann sum førir kandidatin fram. Hetta verður gjørt á látini, sum siður hevur verið síðani 1495. Scott Styles, lektari í lóg við universitetið í Aberdeen boðaði síðani frá, at senatið hevur góðkent Kára á Rógvi sum magistara og lim av universitetinum í Aberdeen og handaði honum húgvu.

Tað er fyrstu ferð, at slíkt hátíðarhald fer fram í Føroyum, og hetta er so ein fyrsta roynd at føra bretsku traditónina til Føroya. Og fyri tey, sum vóru hjástødd á Setrinum mikukvøldið, var henda stutta hátíðarløtan avgjørt øðrvísi og meira hátíðarlig enn tað vit eru von við.



**Kári á Rógvi, núklæktur »Master of Law« við The University of Aberdeen, eftir væl eydnaða seremoni á Setrinum**



**Mamman, Súsanna, fegin um Masterheitið hjá soninum**



Kári á Rógvi hevur løgfrøðiliga embætisútbúgving úr Danmark. Hon tók fimm ár. Síðani fór hann til Aberdeen at taka masterútbúgvingina uppá eitt ár aftrat. Treytin fyri at kunna koma inn á hesa sonevndu masterútbúgving er tann, at tú hevur eina grundútbúgving frammanundan.

Av tí at tað bar so illa til at vera til steðar við seremoniina í Aberdeen í november varð avgjørt at flyta hana til Føroya.

Tað er eisini í hesum sambandi, at ein av undirvísarunum við universitetið í Aberdeen, Scott Styles hevur vitjað skúlar í Føroyum fyri at greiða frá møguleikunum at útbúgva seg í Skotlandi.

Kári á Rógvi heldur tað vera ein góðan møguleika hjá føroyingum, sum fyrst fáa eina grundútbúgving í Føroyum at halda fram við masterútbúgving í Skotlandi. Tað skuldu tí verið góðir møguleikar fyri samstarvi millum lærdu háskúlarnar í báðum londum.

**Oljurættur sergrein**

Kári á Rógvi byrjaði í Aberdeen á heysti 98 og lat inn høvuðsuppgávu árið eftir. Hann valdi at taka upp evnið oljurættur og um somu tíð lærdi hann eisini at brúka eina ávísa metodu ella arbeiðslag. Í útbúgvingini eru tvey vanlig semestur og so ein høvuðsuppgáva. Sjálvur valdi Kári at gera sítt speciali um samarbeiðsavtalur innan fyri oljuvinnuna, um hvørjar skyldurnar eru millum partarnar í eini slíkari avtalu og her serliga við atliti til, hvussu føroyskur rættur fer at handfara teir spurningarnar, tá ið avtalur um oljusamtøk koma til Føroya.

Í dag er Kári á Rógvi skrivari í nevndini, sum arbeiðir við eini føroyskari grundlóg. Tað arbeiðið skal vera liðugt við árslok. Hann viðgongur, at hann ikki í hesum arbeiðinum brúkar tað innihaldsliga frá útbúgvingini tvs. fakið oljurætt, men ístaðin ger hann nógv brúk av teimum øðrvísi metodunum, sum skotar hava.

-Teir duga eitt sindur betri ella gera meira enn t.d. danir við at læra seg skilja rættarpraksis. Tvs. at meðan danir leggja størri dent á lógir og lærubøkur, so leggja skotar størri dent á rættarpraksis, og eg haldi, at bæði tað skotska og tað danska hava styrkt meg nógv, soleiðis at hetta at skilja fordømi og tað at duga at skriva góðar grundgevingar, er nakað sum eg havi nógv burtur úr frá undirvísingini í Skotlandi.

Kári á Rógvi dylur ikki fyri, at hann eftir at grundlógararbeiðið er liðugt, fer at venda aftur til at arbeiða meira við oljurætti og vinnuligum evnum.

**Tørvur á gransking innan løgfrøði**

Nú hann hevur havt møguleika at eygleiða oljuútviklingin í Føroyum frá síðulinjuni, so heldur hann, at eins og føroyingar hava granskað havumhvørvið í Føroyum fyri at vita, hvat var, áðrenn oljuvinnan kom, soleiðis kundi man eisini granskað meira av løgfrøðini, soleiðis at vit vita eitt sindur meira um tey rættarøkini, sum eru føroysk burturav, tvs. tey sum longu eru yvirtikin frá dønum.

Kári vónar, at hetta kann skunda undir at tað verður granskað eitt sindur meira í løgfrøðini, soleiðis at vit eisini eru fyrireikaðir á tí síðuni. Tað kunnu koma nógvar ymiskar sakir, t.d. bæði um skyldur innanhýsis í oljusamtøkum, endurgjald vegna oljulekar, arbeiðsrættarligar trætur osfr., og tá er gott at vera væl fyrireikaður.

-Tíanverri er eingin gransking í føroyskari løgfrøði. Tann týdningin dugdu íslendingar harafturímóti at síggja, og teir fingu longu tíðliga í farnu øld prestaskúlan til eisini at fevna um løgfrøði, tí teir sóu, at hetta at skilja og granska sína egnu løgfrøði var ein fortreyt fyri veruligum sjálvræði, og tað haldi eg vit helst mugu byrja uppá, áðrenn oljuvinnan kemur rættiliga í gongd.

Kári sipar her til, at vit kundu sett nøkur fólk kanska til at granska sum PHD lesandi. Eitt nú kundu tey samanborið tey rættarøki, sum hava týdning fyri oljuvinnuna í Skotlandi við, hvussu okkara rættarøki nú tackla tað og síðani skjóta upp loysnir um, hvussu vit skulu taka ímóti eini heilt nýggjari vinnu í okkara rættarskipan, sum ikki er von við oljuna. Onnur fakøki hava verið longur frammi í at fyrireika seg til oljuvinnuna gjøgnum gransking enn júst løgfrøði.

**Skeið fyri ikki-juristar**

Kári á Rógvu heldur annars, at vit eiga nógvar dugnaligar juristar, men tað sum manglar er kanska tann meira óhefta granskingin tvs. tað at hava nakrar lærubókur og nakrar doktarritgerðir, sum gjølla lýsa eitt øki meira óheft. Tá løgfrøðiligir spurningar koma fram í Føroyum, so er tað altíð tí, at eitt kontroversielt mál er frammi, og teir juristar, sum úttala seg, gera tað sum partar í málinum, tvs. advoktatur umboðandi ein av pørtunum ella almennur juristur umboðandi tað almenna. Tvs. at tann meira neutrala metingin er ikki í Føroyum. Og tað kundi verið gott at bøtt um.

Kári á Rógvi sigur annars, at arbeitt verður við at fáa juridiska gransking, endurútbúgving eins og skeið fyri ikki-juristar stovnað á Fróðskaparsetrinum. Her er tó ikki talan um grundútbúgving fyri juristar.



**Framman frá vinstru: Súsanna og Eyðun á Rógvi, Kári á Rógvi, Scott Styles og Heðin Poulsen. Aftan frá vinstru: Jóannes Dalsgaard, Jóan Pauli Joensen og Andras Mortensen**